







Hvussu heldur tú ólavsøku?

## Njóti ólavsøkuna


*Rói Patursson, háskúlastjóri*

– Størsti parturin av ólavsøkuni fyri mítt viðkomandi fer fram her á skúlanum. Ólavsøkuaftan klokkan 17 er fólkafundur her, og tað koma vanliga nógv fólk. Síðani hava vit opið hús, so meginparturin av tí degnum fer framvið her á skúlanum. Onkuntíð hevur tað tó eydnast mær at fáa kappróðurin við.

Ólavsøkudagur fer við at hugna mær saman við familjuni. Ganga ein túr í býnum og hitta fólk, men veðrið hevur ómetaliga nógv at siga. Tí man lagar seg eftir veðrinum, tá man skal halda ólavsøkuna.

Hvussu heldur tú ólavsøku?

## Fyrsta mista ólavsøkan


*Laila Hentze, stjóri í Televarpinum*

– Hetta er fyrstu ferð í lívinum, eg ikki eri á ólavsøku. Vit eru uttanlands, tí vit skulu í brúdleyp bæði áðrenn og aftaná ólavsøku. Men tá eg eri á ólavsøku plagi eg at fara til midnáttarsangin, og seinnu árini eisini til setanina. Annars plagi eg at ganga aftur og fram og tosa við fólk, men annars eru ólavsøkusiðirnir ikki nógvir.

Hetta er, sum sagt, fyrsta ferðin, eg ikki eri heima á ólavsøku, men tað man fara at ganga. Eg sleppi so á ólavsøku næsta ár.

Hvussu heldur tú ólavsøku?

## Norðoyastevna er betri


*Kári Sólstein, útvarpsmaður*

– Annar dagurin hjá mær í ár fer í øllum førum við arbeiði. Eg veit ikki enn, hvør dagur tað verður, so tað er ikki enn heilt avgjørt, hvat eg fari at gera. Men til midnáttarsangin á Vaglinum fari eg altíð, og tað dámar mær væl.

Kanska fari eg ein túr til kappróðurin fyri at møta fólki, og eisini til onkra framsýning. Men eg haldi altso, at norðoyastevnan er betri enn ólavsøkan.

Hvussu heldur tú ólavsøku?

## Fantastiskur stemningur


*Henrik Larsen, landsliðsvenjari í fótbólti*

– Ja, eg komi eg sjálvandi á ólavsøku. Eg skal hyggja eftir steypafinaluni í fótbólti millum B36-GÍ, sum verður spæld ólavsøkudag. Eg var eisini til steypafinaluna í fjør, og tá upplivdi eg sjálvandi eisini ólavsøkuna.

Men fyrstu ferð eg var á ólavsøku var í 1985, tá ið eg var saman við Lyngby í Føroyum og spældi ein dyst. Síðani var eg ikki aftur fyrr enn í fjør.

Tað er ein fantastiskur stemningur á ólavsøku. Eg var millum annað til kappróður og til felagssangin á Vaglinum í fjør, og tað var nakað heilt serligt. Eg rokni við, at eg fari aftur til hetta í ár.




